FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvuppboðssølan 26. mars

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD | EINAR Á BRÚNNI | LÍNA | 430 |
| FD 102 | BYLGJAN | SNELLA | 842 |
| FD 108 | DANITA | SNELLA | 409 |
| FD 131 | HØGHAMAR | SNELLA | 296 |
| FD 136 | LILJA | SNELLA | 493 |
| FD 138 | BYRGI | SNELLA | 505 |
| FD 152 | KROSSTÚGVAN | SNELLA | 555 |
| FD 160 | SVANANES | SNELLA | 190 |
| FD 174 | SILVER BELLE | SNELLA | 740 |
| FD 183 | VÍGDIS | SNELLA | 440 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 923 |
| FD 205 | GRETA | LÍNA | 757 |
| FD 263 | RÚNI | SNELLA | 829 |
| FD 268 | SELNES | SNELLA | 403 |
| FD 306 | VESTURLAND M/S | GØRN | 107 |
| FD 312 | BRODDUR | SNELLA | 452 |
| FD 316 | ANNFRÍÐ | SNELLA | 794 |
| FD 32 | STAPIN | LÍNA | 476 |
| FD 322 | KLETTUR | SNELLA | 233 |
| FD 324 | VÁTANES | SNELLA | 641 |
| FD 348 | SKORATINDUR | SNELLA | 356 |
| FD 361 | SÚLAN | SNELLA | 352 |
| FD 377 | JULIA | SNELLA | 484 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 114 |
| FD 398 | HAVRENNINGUR | SNELLA | 661 |
| FD 418 | EYSTURLÍÐ | SNELLA | 983 |
| FD 453 | GØT ÓLA-JÁKUP | LÍNA | 39 |
| FD 512 | NABBI | SNELLA | 404 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 171 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 2.303 |
| FD 589 | FIMM SYSTRAR | SNELLA | 535 |
| FD 612 | KNØRRUR | SNELLA | 587 |
| FD 68 | ROYNDIN FRÍÐA | SNELLA | 634 |
| FD 761 | GUNNVÁ | SNELLA | 455 |
| FD 77 | IRDI | SNELLA | 375 |
| FD 771 | KATRIN | SNELLA | 1.035 |
| FD 775 | LANGANES | SNELLA | 112 |
| FD 812 | GEIRHÓLMUR | LÍNA | 2.654 |
| FD 884 | ÁLKAN | SNELLA | 325 |
| FD 89 | HØVDIN | SNELLA | 546 |
| FD1019 | HEGRIN | SNELLA | 193 |
| FD1046 | MIÐHAMAR | SNELLA | 313 |
| FD1054 | ALDUBÁRAN | SNELLA | 385 |
| FD1098 | BYLGJAN | SNELLA | 424 |
| FD1108 | LUNA | SNELLA | 216 |
| FD1110 | ARCTIC | SNELLA | 335 |
| FD1116 | FRIDA | SNELLA | 492 |
| FD1130 | SJÓBÚGVIN | SNELLA | 446 |
| FD1137 | RIVTANGI | LÍNA | 2.043 |
| FD1140 | EYÐIN | SNELLA | 710 |
| FD1144 | NESHAMAR | SNELLA | 264 |
| KG 125 | BJARNABERG | SNELLA | 45 |
| KG 127 | SKURÐAKLETTUR | LÍNA | 2.266 |
| KG 129 | BRATTABERG | SNELLA | 534 |
| KG 143 | KALLANES | SNELLA | 191 |
| KG 21 | KYRRASUND | SNELLA | 575 |
| KG 240 | HVÍTIKLETTUR | LÍNA | 119 |
| KG 244 | ÅGOT | LÍNA | 235 |
| KG 276 | SKORHAMAR | LÍNA | 814 |
| KG 279 | NORÐBERG | LÍNA | 3.578 |
| KG 284 | HELLISENDI | LÍNA | 1.525 |
| KG 288 | HELTNIN | LÍNA | 1.654 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| KG 32 | KRISTIAN Í VÁGI | SNELLA | 231 |
| KG 320 | KROSSTEINUR | SNELLA | 335 |
| KG 323 | TURIÐ | SNELLA | 4.393 |
| KG 334 | NORÐAN | LÍNA | 3.032 |
| KG 407 | JØKUL | LÍNA | 1.648 |
| KG 430 | BÁRAN | LÍNA | 1.115 |
| KG 444 | HEIÐABRÚGV | SNELLA | 259 |
| KG 450 | ALDAN | SNELLA | 161 |
| KG 464 | HAVNATINDUR | SNELLA | 186 |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 2.514 |
| KG 507 | SØKIN | LÍNA | 2.985 |
| KG 548 | ELIN H | SNELLA | 362 |
| KG 561 | FAGRIKLETTUR | LÍNA | 852 |
| KG 587 | REYNSMÚLI | LÍNA | 4.001 |
| KG 589 | KALLANES | LÍNA | 1.903 |
| KG 602 | LÍÐHAMAR | LÍNA | 3.097 |
| KG 608 | HERDIS | SNELLA | 404 |
| KG 63 | POLLUR | SNELLA | 78 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 166 |
| KG 706 | SKÝLISKLETTUR | SNELLA | 616 |
| KG 741 | TRÝ SYSTKIN | SNELLA | 457 |
| KG 744 | OSLA | LÍNA | 5.720 |
| KG 79 | NEVIÐ REYÐA | LÍNA | 2.103 |
| KG 888 | RANNVÁ | SNELLA | 258 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 342 |
| SA 110 | LETJAN | SNELLA | 451 |
| SA 130 | SYÐRABERG | SNELLA | 582 |
| SA 280 | SNIGÁLVUR | SNELLA | 377 |
| SA 350 | HVESSINGUR | SNELLA | 420 |
| TG 122 | FRÍÐHILD | SNELLA | 356 |
| TG 174 | TURIÐ | SNELLA | 491 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 767 |
| TG 227 | EDVØR | LÍNA | 3.446 |
| TG 267 | HVÍTIKLETTUR | SNELLA | 731 |
| TG 283 | HERDIS | SNELLA | 390 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR | | |
| | V/H. JOENSEN | SNELLA | 756 |
| TG 376 | DÚGVAN | SNELLA | 432 |
| TG 401 | BARBARA | SNELLA | 244 |
| TG 460 | MARIANN | SNELLA | 206 |
| TG 471 | NÚPUR | SNELLA | 253 |
| TG 495 | EGIL M | SNELLA | 529 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| TG 562 | TODNES | SNELLA | 133 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 421 |
| TG 597 | TORSTEIN | SNELLA | 218 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 517 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 705 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 133 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 742 |
| TG 650 | NÍPAN | SNELLA | 119 |
| TG 670 | VÍKABERG | SNELLA | 348 |
| TG 731 | ANNIE M/B | SNELLA | 769 |
| TG 91 | STJØRNAN | SNELLA | 519 |
| TN 213 | LÍRABERG | SNELLA | 255 |
| TN 23 | ESPINGUR | SNELLA | 475 |
| TN 260 | MONICA | SNELLA | 491 |
| TN 288 | INGA MARETA | SNELLA | 280 |
| TN 290 | JUPITER | LÍNA | 499 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 818 |
| TN 892 | NØVAN | SNELLA | 957 |
| TN 91 | LÓMUR | SNELLA | 538 |
| TN 912 | HEINE | SNELLA | 192 |
| TN 964 | HVÍTIFOSSUR | SNELLA | 149 |
| TN1009 | JOAN 2 | SNELLA | 333 |
| TN1053 | KJÓGVIN | SNELLA | 387 |
| TN1099 | LENA | SNELLA | 342 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 267 |
| VA 111 | SIGGA | SNELLA | 240 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 336 |
| VA 165 | FRÍÐA | SNELLA | 291 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 422 |
| VA 287 | SÓLVÁ | SNELLA | 229 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 318 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 230 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 606 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 367 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 352 |
| VA 9 | LÍÐARTANGI | SNELLA | 243 |
| VN 121 | SJÓDRANGUR | SNELLA | 477 |
| VN 152 | SJÓARFOSSUR | SNELLA | 449 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 938 |
| VN 397 | VEÐRANES | SNELLA | 389 |
| VN 409 | NORÐBERG | SNELLA | 344 |





# Gera upsan dýrari

Fiskirannróknarstovan hevur søkt um 1. mill. kr. til eitt upsaátak. Upsin er uml. 1/3 av veiðuni undir Føroyum og tað eru fleiri skip og virkir, sum næstan bara liva av upsanum. Útgangsstøðið er, at ber til at økja um søluvirði á upsa so hevði tað veri hesum fyritøkunum og samfelagnum at gagni. Ætlanin er, at tey skip og virkir, sum hava onkra áhugaverda verkætlan skulu kunna søkja burturav hesum pengunum til verkætlanina.

ítróttur

Nr. 60 • týsdagur • 27. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Okkara menn, sum eru staddir í Russlandi, fara at skriva upptakt til landsdystin, sum verður mikukvøldið**

# Todi er gandaður á landsliðnum

**Tær átta túsund krónurnar, sum allir spælararnir fingu fyri sigurin á Luksemburg, telja lítið ímóti tí, sum FCK maðurin missir, um hann verður uttanfyri í fleiri vikur**



*Todi var sera óheppin at blíva skaddur í dystinum ímóti Luxemburg*
*Mynd: Álvur Haraldssen*

Tað tykist sum um Todi Jónsson er gandaður, tá hann umboðar Føroyar. Skaðarnir hava verið nógvir, og leygardagin varð enn eina ferð sjøtul settur á eitt skaða kapitul. Hvussu langur steðgurin verður hesa ferð, var ikki greitt, tá blaðið fór til prentingar. Landsliðslæknin, Torbjørn Viderø, segði seg eftir dystin rokna við, at tað fór at verða neyðugt hjá Toda at binda frið í 3–5 vikur.

Todi sat á beinkinum eina løtu, eftir at hann kendi seg noyddan at fara av vøllinum. Hann staðfesti, at avloysarin, Christian Høgni Jacobsen, stóð seg væl. Í 2. hálvleiki var Todi í umklæðingarrúminum:

– Tað var hugaligt at hoyra, at liðfelagarnir høvdu vunnið. Men sjálvandi lá tað illa fyri hjá mær á sama hátt sum hinir at taka lut í gleðini, sum liðfelagarnir vístu, tá teir komu aftur í umklæðingarrúmið. Tá vit komu á gistingarhúsið, sóu vit brot úr dystunum í sjónvarpinum. Málini vóru væl spæld, og eg ynski liðfeløgunum alt tað besta í Moskva.

Hetta sigur Todi Jónsson, sum kom til Keypmannahavnar sunnudagin klokkan trý. Fyrraparts venjingin hjá FCK var avlýst í gjár. Teir skuldu venja klokkan trý seinnapartin, og tá skuldi læknin hjá FCK kanna skaðan.

Tað varð frammanundan roknað við, at talan var um ein álvarsligan vøddaskaða. Tey, sum hava skil fyri tí, siga, at tað nyttar einki at fara undir viðgerð, fyrrenn skaðin so at siga er liðugur at gera um seg:

– Eg var staddur í høgru síðu, tá eg rætti meg eftir einum bólti. Eg kendi, at okkurt brast í lærinum, og eg gavst at spæla beinanvegin. Eg rokni avgjørt ikki við, at tað verður møguligt hjá mær at spæla við FCK í Brøndby komandi sunnudag. Spurningurin er, hvussu langur steðgurin verður, men eg kvígi fyri, at tað verður neyðugt at binda frið í fleiri vikur, segði Todi Jónsson úr Keypmannahavn, áðrenn hann fór í felagið, har hann ivaleyst skuldi hitta ábyrgdarmenninar kring FCK. Her verður m. a. hugsað um bossin, Flemming Østergaard, sum bæði fekk Toda til Lyngby og FCK, um ítróttarstjóran Niels Christian Holmstrøm og venjaran, Roy Hodgson.

At Todi ikki er tøkur kemur illa við hjá omanfyri nevndu og øllum í FCK. Føroyska álopsessið var saman við Ståle Solbakken mettur millum lyklaspælararnar til torføra útidystin í Brøndby komandi sunnudag. Nú verður hvørgin teirra á liðnum.

## Fíggjarligur missur

Sáttmálin millum FSF og landsliðsspælararnar sigur, at hvør spælari skal hava átta túsund krónur fyri sigurin í Luksemburg. Hjá mongum man hetta vera fitt at fáa, men tað er einki at taka seg aftur í, at fyri Toda vóru tær átta túsund krónurnar dýrt keyptar.

Fótbóltsspælarar siga sjáldan ella ongantíð nakað um síni lønarviðurskifti, og tað ger Todi Jónsson heldur ikki. Men í donskum fjølmiðlum hevur fleiri ferðir verið sagt og skrivað, at spælararnir í FCK eru ímillum teir best løntu í superliguni. Lønin er oftast sett saman av einari mánaðarløn, einari viðbót fyri at vera ímillum teir fyrstu ellivu, og einari aðrari viðbót, sum verður latin fyri stig og sigrar.

Hóast hann er skaddur, so fær Todi mánaðarlønina í FCK. Viðbótina fyri at vera ímillum teir fyrstu ellivu hevði hann fingið næstu vikurnar, tí hann hevur verið einasti tryggi maðurin í álopinum. Nú fellur henda viðbótin burtur í kanska 3–5 vikur. Næsta takið hjá Toda verður at vinna fasta plássið aftur. Eftir einki at hava gjørt í fleiri vikur, verður tað ikki so sjálvsagt.

FCK hevur havt undanvind síðstu vikurnar. Tað hevur givið stig hvørja ferð og harvið eina viðbót. Eisini hesa viðbótina missir Todi, um skaðin fer at halda honum burtur av liðnum. Tað er neyvan at skjóta í blindum, tá vit rokna við, at missurin skjótt verður fleiri ferðir átta túsund krónur.

## Fleiri dúgv tíðarskeið við skaða

Todi Jónsson hevur spælt 43 landsdystir. Hann spældi fyrstu ferð á landsliðnum í 10. altjóða skrásetta landsdsytinum. 15. juli í ár vera tað tíggu ár síðani 1–1 javnleikin ímóti Turkalandi. Landsdysturin móti Luksemburg var nummar 71. Todi hevur verið mettur at vera evni til byrjunaruppstillingina í teimum 61 dystunum, sum hava verið á skránni í hesi tíggju árini, men skaðar hava fleiri ferðir hildið honum uttanfyri, og fleiri ferðir eru skaðarnir komnir í sambandi við landsdystir.

Í fjør var ein skaði undir venjing dagin fyri dystin ímóti Slovenia orsøk til, at Todi bara spældi 58 minuttir, og at hann gekk skaddur í FCK í fleiri vikur. Hetta hevið við sær, at hann ikki fekk spælt í Sveis í oktober. Eitt annað av fleiri dømum um skaðar í sambandi við landsdystir var í San Marino 11. oktober í 1995. Todi skoraði øll tey føroysku málini í 3–1 sigrinum. Ta ferðina var tað, at skaðin í lærkrikanum fór at gera um seg. Skaðin hevði við sær, at Todi so at siga ikki fekk spælt í níggju mánaðir. Í hesum tíðarskeiðnum vóru fimm landsdystir á skránni.

Hugburðurin hjá flestu feløgum er, at tey fegin vilja hava sínar spælarar at vera á landsliðnum. Hetta verður mett at vera gott PR. Nú Todi Jónsson enn eina ferð er komin skaddur aftur av landsliðsferð, er spurningurin kanska, hvussu glaðir ábyrgdarmenninir í FCK eru fyri, at teir hava sáttmála við ein føroyskan landsliðsspælara. Tað er neyvan serliga torført at ímynda sær, at teir einki høvdu havt ímóti, at teir høvdu sáttmála við ein fyrrverandi føroyskan landsliðsspælara. Men tað hava vit einki hoyrt um.

At Todi meiri ella minni tykist vera gandaður, tá hann spælir fyri føðilandið, tað boða hagtølini frá.

**jh**